

Maersk Edgar við bryggju í Runavík. Mynd Eli Lassen

# Maersk tangaskip í kjalarvørrinum á West Hercules

Deil:

**Jan Müller**

07.12.2014 - 11:42

Oljan.fo

Í morgun tíðliga kom oljutangaskipið "Maersk Edgar" á Skálafjørðin, har tað skal liggja við bryggju í Runavík í nakrar dagar, meðan MEST ger umvælingar. Avtala er gjørd millum MEST og Maersk Tankers og er hetta fyrsta av slíkum slag. Ongantíð áður hevur eitt av teimum bláu verið í Føroyum og fingið umvælingar gjørdar. Hetta kemur annars stutt eftir at boripallurin West Hercules varð umvældur á fjørðinum. So ikki kann sigast annað enn, at føroyskir veitarar hava verið úti um seg og hava megnað at fáa tvær stórar

og nýggjar uppgávur. Við hesum báðum - einum boripalli og nú einum oljutangaskipi - í odrarbókunum - má sigast, at tað er ruddað slóð fyri líknandi uppgávum í framtíðini.

   